# Tórfinn kann skriva

Minnilutin í býráðnum heldur ikki, at tað er rætt, at ein faldari um Havnini verður skrivaður av Tórfinni Smith, býráðslimi, uttan at hetta er boðið út.

Talan er um ein faldara við upplýsingum um átøk og ætlanir hjá politiska myndugleikanum og umsitingini í kommuni.

Fyritøkan hjá Tórfinn Smith, Rit&Ráð, fekk tólv túsund krónur fyri at skriva og leggja faldaran til rættis.

Leivur Hansen helt, at talan var um eitt brot á kommulógina, og hann segði seg vilja fara víðari við málinum.

Eisini málið viðvíkjandi mannagongdunum kann hugsast at fara til ein landsmyndugleika til støðutakan.

Jan Christiansen helt, at hetta var at gera nakað burturúr ongum. Hann vísti á, at Tórfinn Smith eftir hansara tykki var væl kvalifiseraður til uppgávuna. Eisini nýtti borgarstjórin nógva tíð til at vísa á, at hesin faldarin var væl bíligari enn ein bóklingur, ið varð givin stutt undan síðsta kommunuvali – tá Leivur Hansen var borgarstjóri.

**-HR**

# Ein rein komedia



*Meirilutin: ...Hesi halda, at minnilutin grenjar ov nógv.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

**Býráðsfundurin í Havn hóskvøldið gjørdist ein reinur glantrileikur, har fáu oyrarnir fingu klandur, fjas, agg og sjónleik í samfullar fýra tímar**

BÝRÀÐSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Er stríðið millum Jan Christian og Heðin Mortensen kólna, so er stríðið millum meiriluta og minniluta heitari enn nakrantíð.

Nøkur heilt fá fólk sótu sum áhoyrarar til býráðsfundin hóskvøldið. Og hetta skuldi gerast ein býráðsfundur, áhoyrarnir fara at minnast, men so avgjørt ikki fyri tað góða.

Men hví góðar og sakligar viðgerðir, tá tað heldur ber til at klandrast og skjóta eftir hvørjum øðrum í samfullar fýra tímar.

Allur fundurin sum hann gjørdist eitt langt drúgt stríð millum meiriluta og minniluta í Tórshavnar býráð.

Hóast nógv varð sagt, so er lítið, sum er hugaligt at festa á blað. Hæddarpunktið á fundinum var, tá býráðsformaðurin, Jan Christiansen, hótti við at koyra Jógvan Arge av fundinum, um hesin ikki skikkaði sær pent.

Meirilutin og minnilutin kundu hóskvøldið illa semjast um, hvat vendi upp ella niður. Gjógvin millum partarnar vaks bara sum fundurin leið.

Í hvørjum einasta málið varð dúgliga tosað aftur og fram um mannagongdirnar.

Meirilutin vildi hava tað soleiðis, at tey flestu málini uttan nøkur serstøk vóru løgd fram til kunningar – og ikki til støðutakan. Hetta kundi minnilutin ikki góðtaka, og fyri hvørt mál vak orrustan meira og meira.

– Diktaturur, segði minnilutin, og meirilutin setti hart móti hørðum. Og so mældi prátið rundanum seg sjálvt óteljandi ferðir.

Orðaljóðið gjørdist stundum ógvuliga ódámligt, og ein skattgjaldari í Tórshavnar kommunu hevði vallað sovið betri um náttina við býráðsfundinum hóskvøldið í huganum.

Klandur, nógv agg og heilt fitt av sjónleiki dugdu garvaðu politikararnir í Tórshavnar at hála fram hesar fýra tímar, fundurin vardi.

Alt skuldi fáa viðmerkingar, og prikini vóru alt annað enn skemtilig ella dámlig.

Nógvu málini snúðu seg um dagstovnar, og børnini á stovninum duga mestur ikki betri at kasta eftir hvørjum og seta órímilig krøv.

Hóast onkur glotti hómaðist, so var samlaða upplivingin ógvuliga syrgilig.



*Minnilutin: Hesi halda, at alt meirilutin sigur og ger er skeivt.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

# Dagstovnur í Hoyvíkshaganum

Fyri ein samlaðan kostnað áljóðandi 15 milliónir krónur verður ein dagstovnur bygdur í Klingruni í Hoyvík. Stovnurin ovarlaga í Hoyvíkshaganum er ætlaður at rúma 96 børnum – 24 vøggustovubørnum og 72 barnagarðsbørnum.

Eisini Eystanfyri Løgmannabreyt ætlar Tórshavnar býráð at byggja ein nýggjan dagstovn.

Hesin skal rúma tólv vøggustovubørnum og 32 barnagarðsbørnum.

**-HR**

# Framhaldsdeild í Kollafirði

Kollafjarðar skúli skal umbyggjast fyri einar seytjan milliónir – uttan MvG. Hetta hevur Mentamálanevndin hjá Tórshavnar býráð gjørt av.

Byggingin verður býtt upp í tvey byggistig. 1 byggistig skal vera liðugt á sumri 2004, og 2. byggistig skal vera liðugt á sumri 2005.

Útbyggingin í Kollafjarða skúla merkir seks nýggjar skúlastovur, bókasavn/námsdepil og onnur høli.

Við nýggju hølisviðurskiftunum skal framhaldsdeild eisini vera í Kollafirði, soleiðis at kollfirðingar sleppa undan at ferðast langa veg tey síðstu árini í fólkaskúlanum. 10. flokkur verður tó ikki í Kollafirði.

Tórshavnar býráð ætlar at játta peningin tey komandi árini.

Tann stórt saknaða ítróttarhøllin í Kollafirði skal ein áhugabólkur standa fyri, og Tórshavnar kommuna letur væntandi eini 30% í stuðuli, men óvist er, hvar restin av fíggingini skal koma frá.

**-HR**



Tórshavnar býráð:

# Játta meira pening til Tórsvøll

**Tórshavnar býráð hevur gjørt av at stuðla Tórsvallargrunninum við tveimum milliónum afturat. Hetta stigið er enn ein forðing fyri, at rennibreyt verður um vøllin – og kanska endaliga forðingin**

TÒRSVØLLUR
*Heri á Rógvi*

Sum síðsta mál á skránni frá meirilutanum í Tórshavnar býráð stóð uppskot um stuðul til Tórsvøll á skránni á drúgva og rokuta býráðsfundinum hóskvøldið.

Sum Sosialurin skrivaði fyrr í vikuni hevði Fíggjarnevndin gjørt av at læta Tórsvallargrunninum tvær milliónir í stuðuli afturat. Peningurin verður innførdur sum stovnsfæ, men peningurin skal nýtast til eitt lán og ymsar nýbyggingar.

Tórshavnar býráð samtykti hóskvøldið at geva stuðulin við tíggju atkvøðum fyri og tveimum – Hildur Eyðunsdóttir og Beate L. Samuelsen – ímóti.



*Ein rennibreyt um Tórsvøll er ikki nakað, sum eigur stóran áhuga í Tórshavnar býráði. Størstan týdning hevur, at vøllurin er klárur til dystin móti Týsklandi í juni.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

## Lán og trappur

Sum nevnt skulu pengarnir nýtast partvíst til at innfría eitt lán og partvíst til at gera trappur og wc fyri.

Tað er einamest við dystinum móti Týsklandi í juni í huga, at bygt verður afturat. Krøvini til altjóða dystir tilskila, at fólk ikki skulu ganga – sum gjørt verður nú – rundanum vøllin. Fyri at skipa fyri hesum verða trappur gjørdar, so fólk kunnu ganga beint niðan á áskoðararplássini.

Hetta arbeiðið hevur skund, tí týskarar koma longu á vitjan um minni enn fýra mánaðir.

Hetta arbeiðið skal eftir ætlan kosta eina millión at gera.

Hin milliónin frá Tórshavnar býráð fer til at infría eitt lán, ið Tórsvøllargrunnurin hevur tikið hjá HB-Stuðlum, og ger hetta til eitt kommunalt lán.

Lánið verður rentu- og avdráttarfrítt í fimm ár.

## Eingin rennibreyt

Hetta málið skapti eitt sindur av skipaðum kjaki á býráðsfundinum hóskvøldið.

Beate L. Samuelsen, býráðslimur fyri Sambandsflokkin, segði, at hon ikki skilti, hví peningur aftur skuldi játtast til Tórsvøll, tí boðað hevði áður verið frá, at grunnurin sjálvur skuldi standa fyri fíggingini, eftir at kommunan hevði inngoldið stovnsfæið og eina uppruna upphædd til byggjaríið.

Hon visti eisini á, at hon ynskti Tórsvøll har piparið. Orsøkin er tann, at hon metir Tórsvøll vera eitt misprýði fyri høvuðsstaðnum, og Beatel L. Samuelsen segði seg ikki vilja stuðla víðari byggingini av verandi verkætlan.

Hildur Eyðunsdóttir, býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin, segði, at hon vildi ikki atkvøða fyri uppskotinum, tí hetta gjørdi tað mestsum ómøguligt nakrantíð at fáa eina rennibreyt rundanum Tórsvøll.

Jan Christiansen vísti einum parti av kritikkinum hjá Beate L. Samuelsen aftur. Borgarstjórin segði, at tað ongantíð hevur verið sagt, ongir fleiri pengar skulu játtast til Tórsvøll.

Leivur Hansen, sum var býráðsformaður, tá Tórsvøllur kom upp at standa, segði, at henda nýggja byggingin fór at gera ein enda á ætlanum um rennibreyt.

Hann nevndi tosið, sum aftur hevur stungið seg upp við einum áhugabólki á odda, har ynski um rennibreyt um Tórsvøll aftur verður ført fram.

Heðin Mortensen segði, at hendan loysnin ikki var hansara dreymur.

Hann helt fyri, at fært tú ikki tann tú elskar, so mást elska tann, tú fært. Í hesum førinum mugu vit taka til takkar við hesum, helt hann.

Býráðsfundurin vísti greitt, at rennibreyt um Tórsvøll ikki er nøkur raðfesting. Sum ein gardering hevur býráðið eisini ein samtyk, sum ásetur, at Tórsvøllur er fótbóltsvøllur burturav.

# Ongantíð aftur Rás Tórshavn

**Rás Tórshavn er farið í søguna og kemur ongantíð aftur. Hetta staðfesti Tórshavnar býráð hóskvøldið**

SJÒNVARP
*Heri á Rógvi*

Tórshavnar býráð gjørdi á býráðsfundi hóskvøldið enn einaferð greitt, at Rás Tórshavn er farið í søguna, og hetta kommunala tilboðið fáa borgararnir í høvuðsstaðnum ongantíð aftur.

Jógvan Arge, býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin, reisti málið á býráðsfundinum. Hansara uppskot, um at fáa málið upp til nýggja viðgerð, fekk bert atkvøður úr minnilutanum.

Jógvan Arge vísti í viðmerkingunum til uppskotið á, at kommunan hevði gjørt ein risastóran feil við at sleppa sær av við Rás Tórshavn.

Hann kallaði Rás Tórshavn fyri ta bestu kommunalu tænastuna, sum fólk ikki fingu longur, men noyddust ístaðin at gjalda fleiri túsund krónur fyri Televarpið. Hann helt tað tískil vera upp á sítt pláss, at Rás Tórshavn kom aftur á skíggjan, og kommunukassin skuldi rinda kostnaðin.

Hann legði fram eitt roknistykki,har hann vildi vera við, at borgararnir ístaðinfyri at gjalda tvær milliónir í skattinum – nú gjalda kanska einar áttati til veitararnar.

Leivur Hansen, ið bæði er limur í minnilutanum og í Fíggjarnevndini, helt fyri, at býráðið átti at viðganga, at tað hevði gjørt ein feil, og hesin feilurin máttu tey so royna at rætta.

Men minnilutin mátti ásanna, at dagarnir hjá Rás Tórshavn eru taldir, tí meirilutin var púra kaldur mótvegis uppskotinum.

Tórshavnar kommuna riggaði av Rás Tórshavn í fjør. Útgerðin varð seld til Føroya Tele, sum flestum kunnugt er byrjað at endurvarpa sendingar við dóttirfyritøkuni Televarpið.

Hóast málið lá ovast á breddanum í flestu fjølmiðlunum tað mesta av 2002, so hevur hesin spurningurin ongantíð verið fyri í sjálvum býráðnum, og lítil og eingi mótmæli hava verið fyrr enn nú.

Tað var Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar býráði, sum samtykti at selja ognirnar til Føroya Tele.



*Tíðin við Rás Tórshavn er farin, og undirskriftir broyta ikki støðuna hjá meirilutanum í býráðnum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## 3.157

Ein av orsøkunum til, at málið nú er tikið fram, er, at fleiri enn trítúsund undirskriftir eru savnaðar inn í høvuðsstaðnum fyri at vísa misnøgd við mista tilboðið. Undan býráðsfundinum hóskvøldið handaði Synnøva Nolsøe býráðsformanninum 3.157 undirskriftir, sum hon hevur staðið fyri at savna inn.

Undirskriftirnar fingu tó ikki nakra heita móttøka á fundinum. Minnilutin vildi vera við, at hetta var greið tala frá borgarunum. Beate L. Samuelsen úr meiri-lutanum vildi hava eftirkannað, hvussu nógvar undirskriftir "veruliga" vóru, tí trúði ikki upp á, at ikki eingin hevði skrivað undir fleiri ferðir.

Meiriluta limirnir, ið tóku orðið, vóru ikki í iva um, at rætt var gjørt við at sleppa sær av við Rás Tórshavn. Tórfinn Smith helt, at bara tað, at sleppa undan at viðgera rásirnar, var ein nóg góð orsøk.

Jan Christiansen vísti á, at kostnaðurin fyri Rás Tòrshavn vildi fleirfaldast við tíðini.

Argumentið fyri at sleppa sær av við Rás Tórshavn hevur allatíðina verið, at rásirnar støðugt vildi gerast dýrari og dýrari at útvega. Fyrst var tað TV3, sum vildi fara at kosta einar 800.000 árliga, men væntandi var eisini, at hinar rásirnar vildu gerast dýrari. Eisini skuldu fleiri íløgur gerast í tøkniliga útgerð, sum vildi kosta kommununi fleiri milliónir.

Sostatt er tað als einki, ið bendir á, at Rás Tórshavn verður nakað annað enn eitt søguligt minni.

# Útstykking í Hoyvíkshaganum Suður

Tórshavnar býráð samtykti hóskvøldið at fara undir nýggja stóra útstykking í Hoyvíkshaganum. Hendan seinasta útstykkingin fer fram í Hoyvíkshaganum Suður.

Arbeiðið varð boðið út í almennari licitatióin.

Tá avtornaði áttu J & K Petersen og P/F Byggitek lægsta tilboð av teimum seks, ið vórðu latin inn.

Tórshavnar býráð fer eisini at taka av hesum tilboðinum áljóðandi 27,5 mió. uttan MvG. treytað av, at bindandi avtala kann gerast um arbeiðstøkuna.

**-HR**